
NORÐURATLANTISKUR
STUDENTAFLOKKUR
– les meira á nordatlantisk.dk



# Hvat er ein norðuratlantiskur studentaflokkur?

Norðuratlantiski studentaflokkurin er eitt serstakt útbúgvingartilboð til næmingar úr Føroyum, Danmark, Íslandi og Grønlandi, ið ynskja at uppliva norðuratlantiska økið og samstundis fáa eina studentsútbúgving.

Í norðuratlantiska studentaflokkinum ganga næmingar úr teimum fýra londunum í sama flokki í trý ár.

Flokkurin hevur sín egna náttúruvísindaliga profil við lærugreinunum biotøkni, arktiskari tøkni, støddfrøði og alisfrøði.

Sum næmingur í norðuratlantiska flokkinum tekur tú 1. árið á Gribskov Gymnasium, 2. árið á Miðnámi á Kambsdali og á Verzlunarskóla Íslands í Reykjavík og 3. árið á GUX í Sisimiut.

Ætlar tú tær at ganga í norðuratlantiska flokkinum, skal tú innan 1. mars 2019 senda eina grundgivna umsókn inn um upptøku.

Í hesum faldaranum kanst tú lesa meira um, hvat norðuratlantiski studentaflokkurin hevur at bjóða.



# Breyt og lærugreinir í norðuratlantiska studentaflokkinum

Tú fært eina almenna studentsútbúgving við breytarlærugreinunum føroyskt A, biotøkni A, arktisk tøkni C, støddfrøði A og alisfrøði B.

Harumframt hevur tú hesar lærugreinir: Almenn málfatan, náttúruvísindalig innleiðsla, danskt A, søga A, enskt B, ítróttur C, samfelagsfrøði C, fornaldarfrøði C, religión C, miðlar C og mentan C.



**Næmingar í norðuratlantiska studentaflokkinum fáa nakað heilt serligt við sær við at vera í hesum flokkinum. Í norðuratlantiska økinum hava vit ein sterkan mentanarligan felagsskap, sum vit leggja serligan dent á. Næmingarnir lesa og búgva í fýra londum, sum hava nógv til felags, men sum eisini geva næmingunum hvør sítt serliga fokus á norðuratlantiska fakligheit. Næmingarnir skulu ikki bert lesa saman, men búgva eisini saman størsta partin av tíðini í ungdóms- og skúlaheimsbústøðum, og hetta gevur eina kenslu av felagsskapi og at ein er partur av eini størri "familju". Tilsamans skapar hetta sterk sosial bond.**

**Við einum studentsprógvi frá norðuratlantiska studentaflokkinum fær næmingurin møguleika at verða til reiðar til framtíðarinnar arbeiðsmarknaðin við stórum opinleika, har hædd verður tikin fyri ymiskleika, uppfatan av fólkaræði og mentan við fokusi á eitt sterkt norðurlenskt og norðuratlantiskt netverk.**



| Norðuratlantiski studentaflokkurin<br>Biotøkni A, Støddfrøði A, Alisfrøði B við arktiskari tøkni C | 1.g | 2.g | | 3.g |
|---|---|---|---|---|
| | DK | FO | IS | GL |
| Biotøkni A | | | | |
| Støddfrøði A | | | | |
| Alisfrøði B | | | | |
| Danskt A | | | | |
| Søga A | | | | |
| Enskt B | | | | |
| Føroyskt A | | | | |
| Ítrottur C | | | | |
| Samfelagsfrøði C | | | | |
| Miðlakunnleiki C | | | | |
| Fornaldarfrøði C | | | | |
| Religión C | | | | |
| Mentan C | | | | |
| Arktisk tøkni C | | | | |
| Natúrvísindaligt grundskeið | | | | |
| Almen málfatan | | | | |
| Breytarverkætlan innan lestraleiðina | | | | |



# Praktisk viðurskifti



**Víðari útbúgving**

Tú byrjar fyrsta árið á Gribskov Gymnasium og endar 3.s. við eini litríkari próvhandan á GUX Sisimiut. Studentsprógv frá NGK gevur atgongd til eitt breitt úrval av styttri, miðallongum og longri hægri útbúgvingum. Tað kundi til dømis verið upplagt at lisið víðari í norðuratlantiska økinum, eitt nú á arktiskum verkfrøðingalesnaði í Grønlandi, tikið eina norðuratlantiska masterútbúgving í einum NORA-samstarvi ella eina náttúruvísindaliga ella samfelagsvísindaliga arktiska útbúgving í Føroyum, Grønlandi, Íslandi ella Danmark.

## NGK-flokkurin

Sum næmingur í norðuratlantiska studentaflokkinum gongur tú í flokki saman við næmingum úr Íslandi, Føroyum, Grønlandi og Danmark tey trý árini, tú ert studentaskúlanæmingur. Tit verða ein savnaður flokkur, sum ferðast og gongur í skúla saman í teimum norðuratlantisku londunum.

## Hvar og hvussu býr man?

Tann ella tær lestrarhálvurnar, har norðuratlantiski studentaflokkurin er í landinum, haðani tú kemur, kanst tú búgva heima, um tú býrt í nánd av miðnámsskúlanum, t.v.s. Miðnámi á Kambsdali, um tú ert føroyingur.

1. árið á Gribskov Gymnasium býrt tú í ungdómsbústaði. Ein kontaktpersónur verður knýttur at ungdómsbústøðunum, ið m.a. hevur sum uppgávu at skapa góðar sosialar karmar fyri teg og floksfelagarnar og er settur at hjálpa tær við teimum avbjóðingunum, ið standast av at búgva aðrastaðni enn heima.

2. árið býrt tú fyrst í Føroyum og harnæst í Íslandi. Býrt tú í nánd av Miðnámi á Kambsdali, kanst tú búgva heima, annars ber til at búgva hjá privatari vertsfamilju. Í Íslandi fært tú bústað hjá privatari vertsfamilju.

3. árið, ið er í Grønlandi, býrt tú á skúlaheiminum hjá miðnámsskúlanum.

## Hvat kostar hetta?

Næmingurin rindar fyri bústað, mat og ferðing.

Ferðing til og úr teimum 4 norðuratlantisku londunum fer at kosta umleið 15.000-20.000 DKK tilsamans øll 3 árini.

Í Danmark kostar ein ungdómsbústaður umleið 4.000 DKK um mánaðin.

Í Føroyum og Íslandi kostar privat innivist umleið 3.000 til 4.000 DKK um mánaðin.

Í Grønlandi kostar bústaðurin á skúlaheimi umleið 3.000 DKK um mánaðin.

## Útbúgvingarstuðul frá SU

Næmingar úr Danmark, Grønlandi og Føroyum, sum verða tiknir upp á norðuratlantiska studentaútbúgvingina, og sum eru 18 ár og eldri, kunnu søkja um SU.

Næmingar úr Íslandi kunnu ikki søkja um danskan SU, men teir kunnu søkja um SU-lán. Meira kunning um hetta fæst á www.su.dk











## Gribskov Gymnasium

er tann syðsti norðuratlantsskúlin í samstarvinum. Skúlin liggur beint við skóg, og vit nýta lokala nærumhvørvið so nógv, sum vit kunnu í undirvísingini. Umhvørvið á miðnámsskúlanum er merkt av ungum menniskjum, sum eru eldhugað og kreativ í gerandisdegnum. Bústaðurin hjá tær, meðan tú gongur á Gribskov Gymnasium, er ein ungdómsbústaður, sum liggur tætt við skúlan.





## Miðnám á Kambsdali

er í Føroyum. Skúlin er ein miðnámsskúli, har arbeiðsgleði, samstarv og innovatión eru í hásæti. Sum næmingur í norðuratlantiska studentaflokkinum verður tú partur av virkna nærumhvørvinum og samstarvi við vinnulív og stovnar. Vit leggja stóran dent á at brúka fakligheitina, vit læra í gerandisdegnum. Skúlin hevur umleið 500 næmingar og liggur í lítlu bygdini Kambsdali við vøkrum útsýni yvir fjørðin og grøn fjøll. Næmingar úr øðrum londum fáa privata innivist, meðan teir lesa í Føroyum.













**Versló skole í Reykjavik**

í Íslandi hevur sterkar siðvenjur og er ein av fremstu miðnámsskúlunum í Íslandi. Skúlin styrkir næmingarnar til at taka lut í vinnulívi og fólkaræði í samfelagnum. Miðnámsskúlin liggur í einum framkomnum høvuðsstaði og leggur dent á arbeiðsmarknað og tøknifrøði. Á "Versló" verður tú styrkt/ur í at arbeiða við kreativari, sjálvstøðugari og praktiskari hugsan. Beint uttanfyri Reykjavík liggja mong fjøll og eitt geotermiskt landsslag. Næmingarnir fáa privata innivist í Reykjavík, meðan teir lesa í Íslandi.





**GUX Sisimiut**

liggur beint norðanfyri polarkringin í Grønlandi. Á GUX Sisimiut er eitt virkið og tætt miðnáms- og skúlaheimslív, tí nærum allir næmingarnir búgva á skúlaheiminum. Sisimiut er ein býur við 5.000 íbúgvum og er einasti tøkniligi og náttúruvísindaligi miðnámsskúlin í Grønlandi við fleiri tøkniligum lærugreinum á A-stigi. Her fært tú eisini lærugreinir sum arktiska tøkni og mentanarlærugreinir á grønlendskan hátt. Í gerandisdegnum samvirka næmingarnir við íbúgvarnar og felagslív í býnum. Umhvørvið rundan um Sisimiut er opið fyri øll og tú kanst fara gongutúrar í fjøllunum, standa á skíðum og koyra í hundasleðu ella á kavaskutara. Hetta seinasta árið av tíni studentsútbúgving býrt tú í ungdómsbústaði í býnum Sisimiut, har miðnámsskúlin eisini er.



# Hvussu søkir tú um upptøku til norðuratlantiska studentaflokkin?

Tú skalt søkja um upptøku í seinasta lagi 1. mars 2019.

Næmingar úr Føroyum, Íslandi og Grønlandi søkja um upptøku við at senda eina grundgivna umsókn til **post@gribskovgymnasium.dk**

Næmingar úr Danmark søkja á **optagelse.dk** og skulu eisini viðleggja eina grundgivna umsókn.

Les meira á **nordatlantisk.dk**

## Møt einum av tínum flokksfelagum í NGK



*Eg haldi tað hevði verið áhugavert at ferðast runt við einum flokki av blandaðum næmingum, har tú luttekur á ymiskum skúlum í ymiskum londum og møtir fólkum frá Grønlandi, Danmark og Føroyum. Tað er ein størri uppliving at lesa á NGK. Eg havi búð í Danmark og Grønlandi, so tað verður spennandi at læra Føroyar at kenna, tað eri eg ikki óróligur um, og eg havi longu tosað við tveir av mínum góðum vinum um at søkja inn á Norðuratlantiska studentaflokkin í mars.*

Bjørn Olafsson er úr Íslandi, hann er føddur í Danmark og hevur búð í Grønlandi.

**Meira kunning**

Tú kanst skriva til
**post@gribskovgymnasium.dk**
fyri at fáa meira kunning.

Til ber eisini at ringja til
(+45) 48798410.

**Tú kanst lesa meira um teir fýra miðnámsskúlarnar á okkara heimasíðum:**

**Gribskov Gymnasium:**
www.gribskovgymnasium.dk

**Miðnám á Kambsdali:**
kambsdalur.fo
kambsdalur@kambsdalur.fo
Tel. 610800

**Verzlunarskoli Islands:**
verslo.is

**GUX Sisimiut:**
kti.gl/da/uddannelser/gux




**NORÐURATLANTISKUR**
STUDENTAFLOKKUR

Nordatlantisk.dk